*-Vit vónaðu, at tær fóru at koma afturíaftur í øllum góðum*

*Will Demeyer, borgarstjóri í Liége*

# ÚTLAND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800



*Stacy Lemmens.*



*Nathalie Mahy*

# Tær komu afturíaftur – deyðar

**Í meiri enn tvær vikur leitaði belgiska løgreglan eftir Stacy og Nathalie. Í gjár vórðu tær funnar deyðar í einari grøv.**

BELGIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað varkvirt á spæliplássinum tætt við jarnbreytarstøðina í belgiska býnum Liége í gjár. Har plagdu tann sjey ára gamla Stacy Lemmens og 10 ára gamla vinkona hennara, Nathalie Mahy, at spæla hvønn dag, til tær brádliga hvurvu um kvøldið tann 9. juni. Í gjár vórðu tær funnar deyðar í einari grøv við jarnbreytina 150 metrar frá spæliplássinum.

Tá tíðindini bórust, sóust børn og vaksin leggja blómur og kveikja ljós fram við jarnbreytini. Í meiri enn tvær vikur høvdu tey bíðað og vónað, at genturnar fóru at koma afturíaftur, men í gjár fingu tey boðini, sum øll innast inni høvdu væntað at frætta.

Stacy Lemmens og Nathalie Mahy høvdu verið á gøtuveitslu saman við foreldrunum tann 9. juni. Foreldrini vóru farin inn á eina kaffistovu, og tær báðar genturnar spældu í einari hoppiborg uttanfyri. Fleiri hava funnist at foreldrunum, tí tey lótu genturnar spæla úti á náttartíð, tí klokkan var næstan trý, tá tey varnaðust, at genturnar vóru horvnar.

– Hetta er ein sorgardagur hjá okkum øllum. Vit vónaðu, at tær fóru at koma afturíaftur í øllum góðum, og vit kundu ikki sleppa vónini, segði borgarstjórin í Liége, Will Demeyer, eftir at hann hevði fingið boðini um lagnuna hjá teimum báðum gentunum.

Løgreglan hevur tikið ein 38 ára gamlan mann, sum er undir illgruna fyri at hava beint fyri gentunum, men hann noktar seg sekan. Hann varð sæddur uttan fyri kaffistovuna um kvøldið tann 9. juni. Fyri einum hálvum ári síðani slapp hann leysur úr einum fongsli eftir at hava sitið ein dóm, sum hann hevði fingið fyri at hava misnýtt børn kynsaliga.

# Bøndurnir taka lívið av sær

**Tey seinastu trý árini hava 130.000 bøndur í India beint fyri sær**

INDIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað eru viðurskiftini í heimshandlinum, sum fáa indiskar bøndur at geva skarvin yvir, og tá eru nógvir teirra so tyngdir av skuld, at teir síggja sær ongan annan útveg enn at beina fyri sær.

–Heimsbankin fekk okkum at strika avmarkingarnar fyri innfluttum vørum og minstaprísin á landbúnaðarvørum sum eitt nú bummull. Men teir kundu ikki tryggja okkum javnbjóðis kapping á heimsmarknaðinum, so bøndurnir kundu sleppa av við sínar vørur. Tá prísirnir á heimsmarknaðinum fella, økjast sjálvmorðini millum bøndurnar, sigur indiski landbúnaðarfrøðingurin Devinder Sharma við danska blaðið Information.

Ein kanning í landspartinum Maharastra hevur avdúkað, at næstan allir bøndurnir, sum hava tikið lívið av sær, høvdu tikið stór lán fyri at venda gongdini á garðinum. Teir flestu høvdu lænt pengarnar frá pengamonnum og fyritøkum, sum krevja ovurhonds høga rentu, tí teir indisku bankarnir halda tað ikki vera ráðiligt at seta pengar í landbúnaðin.

## STUTT SAGT

## Avsannar alt

Skiparin á russiska trolaranum „Elektron" avsannar, at hann rýmdi undan norsku sjóverjuni í oktober í fjør við tveimum norskum eftirlitsmonnum umborð. Norsku myndugleikarnir hava ákært skiparan fyri at hava fiskað ólógliga í Barentshavinum og fyri at tikið teir báðar eftirlitsmenninar við sær ímóti teirra vilja.

Teir báðir menninir fóru umborð á „Elektron" tann 22. oktober í fjør fyri at kanna veiði og reiðskap, men tá russiski trolarin fekk boð um at koma til Tromsø, gjørdi skiparin av at seta kós ímóti Murmansk ístaðin fyri. Norsk sjóverjuskip fylgdu trolaranum, men hóast fleiri áheitanir sýtti hann fyri at steðga. Ikki fyrr enn hann var komin í russiskan sjógv, sluppu teir báðir eftirlitsmenninar av trolaranum og umborð á eitt av teimum norsku sjóverjuskipunum.

Málið ímóti skiparanum byrjaði í rættinum í Murmansk í gjár, men har segði skiparin seg vera púra ósekan. Hann var ikki rýmdur við teimum báðum norðmonnunum, men hevði gjørt av at fara til Murmansk, tí teir høvdu ikki nóg mikið av olju til at fara til Tromsø, segði hann. Skiparin greiddi frá, at norsk flogfør høvdu tveitt brandbumbur eftir „Elektron", og at norsk krígsskip høvdu jagstrað trolaran.

Sambært norsk um fjølmiðlum er skiparin á „Elektron" vorðin ein sonn hetja í Murmansk eftir tilburðin í heyst, og fiskimannafelagið í Norðurrusslandi hevur innstillað hann til heitið sum „Ársins maður".

## Ávarar um flóðaldur

Fólk fram við Indiska Havinum kunnu væntandi kenna seg eitt sindur tryggari nú, tí í gjár varð ein ávaringarskipan um flóðaldur sett í gongd.

ST, sum hevur havt eftirlit við arbeiðinum, sigur, at skipanin er før fyri at ávara fólk í øllum londunum kring Indiska Havið. Talan er um eitt netverk, sum umfatar 25 støðir, ið máta ristingar í undirgrundini, og 26 støðir, sum bera upplýsingarnar víðari. Harumframt eru tríggjar sera neyvar mátingarstøðir á djúpum vatni, sigur BBC. Sambært ST skal nýggja ávaringarskipanin forða fyri vanlukkum sum henni annan jóladag í 2004, tá ein ógvuslig flóðalda í Indiska Havinum kravdi meiri enn 200.000 mannalív.

Kyrrahavið hevur longu eina tilsvarandi ávaringarskipan, og arbeitt verður við at gera líknandi skipanir fyri Atlantshavið, Miðjarðarhavið og Karibiska Havið, sigur BBC.

## Vit eru øll úr Afrika

Hevur vísindin rætt, eru vit øll ættað undan einum og sama manni, sum búði í Afrika fyri millum 60.000 og 80.000 árum síðani.

Kanningar, sum IBM og National Geographic hava gjørt við gentøkni, eru komnar til ta niðurstøðu, at í dag er tað Sanfólkið ella teir sokallaðu buskmenninir í Afrika, ið líkjast hesum upprunamanninum mest. Hann var sum vera man ikki einsamallur, men hansara genetisku spor eru sjónlig hjá eftirkomarunum enn tann dag í dag, verður sagt.

IBM og National Geographic eru í ferð við at savna DNA-kanningar frá 100.000 fólkum úr øllum heiminum, men longu nú halda tey seg kunna siga við vissu, at vit øll stava frá einum og sama manni í Afrika.

## Út í rúmdina leygardagin

Amerikanska rúmdarumsitingin NASA er farin undir niðurteljingina til at senda rúmdarferjuna Discovery út í rúmdina leygardagin.

Veðurlíkindini hava nógv at siga, tá rúmdarfør skulu sendast avstað, men sambært veðurmonnunum verður veðrið til vildar leygardagin, sunnudagin og mánadagin, og tí er tað rættiliga sannlíkt, at Discovery verður send út í rúmdina sum ætlað, skrivar AP.

Ferðin hjá Discovery er tann fyrsta í næstan eitt ár og onnur ferðin síðani vanlukkuna við Columbia fyri trimum árum síðani.